# Tjóðpallur Føroya og Meginfelag áhugaleikara Føroya

## Reglugerð fyri sjónleikaviðurkenningina "Herðaklappið"

§ 1.

Viðurkenningin ber heitið "Herðaklappið".

§ 2.

Viðurkenningin verður latin 12. mars á hvørjum ári. Viðurkenningin verður latin undir slíkum formi, sum trímannanevnd saman við Tjóðpalli Føroya og Meginfelag áhugaleikara Føroya fyrisetur. Formaðurin í trímannanevndini handar viðurkenningina.

§ 3.

Viðurkenningin verður latin einstaklingi ella felagsskapi, sum í farna álmanakkaári hevur útint eitthvørt, sum hildið verður at hava gagnað ella ment føroyska leiklist.

§ 4.

Viðurkenningin er umframt lutur, gjørdur úr silvuri til endamálið, 12.000,- kr. til sjónleikaferð uttanlands.

§ 5.

Trímannanevnd ger av, hvør ið viðurkenningina skal hava. Tjóðpallur Føroya velur 1 og Meginfelag áhugaleikara Føroya 1 lim í nevndina. 3 limin velur Føroysk Fjølmiðlafólk. Nevndin skipar seg sjálv. 1 limur verður valdur líka ár, 2 limir ólíka ár. Valskeiðið er 2 álmanakkaár. Nevndin skipar seg sjálv.

§ 6.

Skuldi okkurt árið eftir nevndarinnar tykki verið ov lítið avrikað, kann nevndin gera av ikki at lata viðurkenningina.

Tórshavn, 22. januar 2009.

| Tjóðpallur Føroya | Meginfelag áhugaleikara Føroya |
|---|---|
| Jenny C. Petersen, stjóri | Hilmar Joensen, formaður |